# Søgulig vestanstevna



*Valloyran verður ramma um nógv av tiltøkunum, sum verða á Vestanstevnu í Sandavági í ár*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vestanstevnan í ár verður søgulig. Hetta er fyrsta stevnan í Vágum, síðan Vágatunnilin læt upp. Og nógv verður gjørt burtur úr í ár, siga fyrireikararnir**

VESTANSTEVNA
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Vestanstevnan í ár fer at hava rættiliga nógv forkunnugt at bjóða gestunum. Gøtusjónleik, túnatalv, stórfingna vitjan úr Íslandi, Pipar og Salt umframt eina rúgvu av øðrum tiltøkum.

Sandavágs Ítróttarfelag, sum stendur fyri stevnuni, hevur lagt eina drúgva skrá, sum byrjar longu í morgin tann 5. juli, hóast sjálv Vestanstevnan ikki er fyrr enn komandi vikuskifti 11. til 13. juli.

Í morgin, sunnudagin, verður Vestansstevnubingo, sonevnt Drive In bingo, á Valloyruni. Byrjað verður klokkan 18.00, siga fyrireikararnir.

Síðan verður friður soleiðis at siga til fríggjadagin, tá av álvara verður farið í gongd við Vestanstevnuna. Og tað verður við øllum tí, sum stevnur vanliga hava at bjóða. Dans og pylsur, ítrótt og fólkafundir eins og eina rúgvu av øðrum afturat.

Sandavágur fær stóra vitjan úr Íslandi um Vestanstevnuna. Í mong ár hava Sandavágur og Neskaupstaður á Norðfirði í Íslandi verið vinarbygdir, og ikki færri enn 100 íslendingar koma til Sandavágs at vitja á Vestanstevnu.

Og tey hava ymiskt forvitnisligt við sær so sum tónleikashowið Brján, sum fer at verða framført í høllini á Giljanesi leygarkvøldið. Har verður umframt íslendsku framførsluna eisini rock konsert og dansur.

Íslendsku tónleikararnir, sum eru einir 8-10 í tali, hava ferðast víða um Ísland við hesum tiltakinum, og nógv fólk hevur verið til famførslurnar, siga teir.

Men eisini tey lokalu listafólkini hava ymiskt at sýna fram á Vestanstevnu. Ein sera áhugaverdur sjónleikur verður í Sandavági um stevnuna. Tað eru fólk úr Vágum, sum fara t sýna fram gøtusjónleik í Sandavági. Ein nýggjan leik, tey hava gjørt yvir evnið úr søgnini um Seyðamannin á Sondum og ferð hansara Norður á Fjøll, har hann stjól stakkin hjá huldukonuni í Húsagjógv.

Dansað verður eisini á Vestanstevnu. Ikki bara tann dansin, vit vanliga síggja í Føroyum, uttan eisini meira forkunnugan latínskan dans. Í vetur og vár hava ungfólk gingið til sambadans í SíF húsinum, sum ein ung brasiliansk kvinna hevur staðið fyri. So her ber til at síggja tað ektaðu vøruna. Brasilianskt samba.

Eisini tann skemtiliga síðan av føroyskum undirhaldi verður á Vestanstevnu, tá Pipar og Salt fara at hava framførslu á stevnuni.

Árið er lýst ár teirra brekaðu at vera, og eftir fólkafundin í Løgmansgarðinum sunnudagin, fer væl umtókta orkestrið Emma's Blues Band at undirhalda.

Talvbygd er, og Sandavágur eigur ein av frægu telvarunum, sum hava verið í landinum. Multitalentið Torkil Nielsen. Og hann fer at seta æruna upp á spæl í einum túnatalvi, har enn ikki er endaliga avgjørt, hvør mótparturin verður.

Og so er tað allur ítróttturin, sum verður bæði á vágni, á vøllinum og í høllini. Bæði hond- og fótbóltur umframt FM kapproðurin.

Til undirhalds er vanligt at hava skemt á fótbóltsvøllinum og fram við -og/ella eisini viðhvørt í -ánni, og tað verður ivaleyst eisini hesa Vestanstevnuna, siga fyrireikararnir í Sandavágs Ítróttarfelag.






## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Solvej Dam Pedersen**
Fredericia

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*
**Anne Elise og Birgit**



# Sunnasta pizza í Føroyum



*Bjartur Vest letur í dag, leygardagin, upp Pizzakøkin í Vági*

**Í dag, leygardagin, letur Pizzakøkurin upp í Vági. Hetta er nýtt matstað, ið m.a. hevur pizza, kebab og suppu og talan er um sonevnt Take Away, tað vil siga matur út av húsinum**

PIZZA
*Dagfinn Olsen*

**Vágur:** Leygardagin ber til at fáa sunnastu pizzur í Føroyum. Í øllum førum, um sunnast verður lisið sum ættin suður - ella syðst. Leygardagin letur nýtt matstað upp í Vági, har m.a. pizzur eru at fáa, og longur suður sleppur ein neyvan, um tað er pizza ein leitar eftir, so hesar eru nokk tær sunnastu/syðstu.

Tað er Bjartur Vest, sum leygardagin klokkan 17 letur hurðarnar upp til Pizzakøkin. Bjartur hevur royndir sum pizzakokkur á matstøðum í Havn.

Fleiri vágbingar hava kanska undrast síðstu mánaðirnar yvir, hvat virksemi fer fram í gomlu Toftabúðini. Har hevur verið riggað til Pizzakøkin og burturúr eru komin snotulig høli, ið hava góðar umstøður til bæði starvsfólk og kundar. Borð og stólar eru, so ein fær hvílt beinini, meðan pizzan er í ovninum.

### Útkoyring

Talan er um sonevnt Take away: Matur út av húsinum. Umframt at ringja og bíleggja ella leggja leiðina framvið, so er eisini útkoyring partur av tænastuni.

Heili 26 pizzasløg eru í at velja og ikki sørt, at hugflog og skemt hevur verið við, tá nøkur av heitunum eru funnin. Ein lættipizza nevnist t.d. Twiggy (summi minnast klønu fotomodellina) og aftan fyri nakrar stendur sterk, sera sterk ella krút! Ymsar støddir eru í at velja: 9”,12” og 16”.

Umframt pizzur fæst eisini kebab og suppur.

Opið er mánadag til fríggjadag frá klokkan 17 til 23, leygardag til klokkan 24 og sunnudag til klokkan 22.

Bjartur vónar, at virksemi aftur verður í Vági, eftir at alt mestsum datt niðurfyri og legði bygdina lamna herfyri. Kemur gongd á aftur, eins og tá farið varð undir ætlanina við Pizzakøkinum, so verður kanska opið á miðdegi eisini.

Frammanundan eru pizzasølur í Suðuroynni, nærri merkt á Tvøroyri, men nú ber eisini til at fáa sær eina pizzu ella annan gloypibita í syðru helvt av oynni.

# Familjan í Túni hittist á Skála

**Stór ættarstevna verður 25. juli á Skála fyri eftirkomarar niður í fimta lið eftir familjuni í Túni á Toftum**

ÆTTARSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Í morgin er seinasta freist hjá teimum, ið ætla sær við til ættarstevnuan hjá teimum »í Túni« at tekna seg. Veitslan verður í ítróttarhøllini á Skála tann 25. juli.

Í tíðindaskrivi siga fyrireikararnir, at av trímenningum - tey í triðja liði - eru fleiri ikki okkaramillum meira, men so eru fermenningarnir fjølmentir. Fyrireikararnir siga, at tey eru komin ásamt um eisini at bjóða teimum vaksnu við maka í fimta liði við.

Familjan er stór og hevur eisini greinað seg bæði til Íslands og Noregs. Úr Noreg koma 20 fólk til stevnuna.

Thorleif Hansen og Josefina Jacobsen hava gjørt skriftligt tilfar um familjuna í Túni, sum verður at fáa á stevnuni.

Fyriskiparar:
Jóanis Rubeksen, tel 312341
Elinborg Solmunde tel 441438
Josefina Jacobsen tel 447438
Flóvin Jacobsen tel 328001
Jovina Højgaard tel 312755
Emil Hansen tel 447178


